# Tryggur B36 sigur

*2. deild: Í einum heldur linligum dysti, vunnu teir næstbestu hjá B36 sannførandi á teimum næstbestu hjá KÍ*

JÁKUP MØRK

Tað vóru teir næstbestu hjá báðum feløgunum, sum brustu saman, tá aðrudeildarliðini hjá B36 og KÍ fóru undir landskappingina 2000.

**B36 betur fyri**

Longu tíðliga í dystinum tóktist tað vera greitt, at ungu B36 leikararnir vóru væl betur fyri enn klaksvíkingarnir.

Fleiri ferðir leiktu teir seg fram til vandamiklar málmøguleikar, men tað skuldi eitt brotsspark til, áðrenn B36 kundi leggja seg á odda.

Hetta kom, tá Helgi Justinussen royndi at bróta ígjøgnum í vinstru. Beini vórðu tikin undan honum, og dómarin var ikki í iva. Karl Leonsson takkaði fyri, og við einum dundurskoti sendi hann bóltin í málið.

Móti endanum av fyrra hálvleiki eydnaðist Johnny Joensen at økja um leiðsluna, eftir innlegg úr høgru og eitt sindur av aftur og fram í KÍ brotssteiginum.

B36 yvirvágin helt sær eisini í seinna hálvleiki, men fleiri mál komu ikki í dystinum.

Ikki tí, møguleikarnir trutu ikki, men skotroyndirnar vóru í flestu førum alt ov óneyvar.

**Egin í mál**

Sum nevnt, so var talan á B36 liðnum um fleiri ungar leikarar, og soleiðis var eisini á KÍ liðnum.

Talan var tó ikki bert um unglingar, tí í B36 málinum stóð Egin Høgnesen. Einki er at taka seg aftur í, at hetta skapti tryggleika í aftasta røð á B36 liðnum. Viðhaldsfólkini hjá B36 skulu tó helst ikki vænta sær at síggja Egin á besta liðnum aftur, men kortini munnu tey fegast um, at hann á henda hátt kann vera við til at tryggja framtíð felagsins.

**B36 KÍ 2-0 (2-0)**

1-0 Karl Leonsson (br.)
2-0 Johnny Joensen

Dómari: Hans F. Hansen



*Helgi Justinussen ognaði B36 brotssparkið, sum teir fingu um miðjan fyrra hálvleik*

***Mynd: Álvur Haraldsen***



*Meginpartin av tíðini vóru tað gøtumenn, sum royndu at skapa sær nakrar møguleikar, men í 85 minuttur megnaðu sumbingarnir at verja fyri*

***Mynd: Jonhard Hammer***

# Trýstið gav úrslit

*1. deild: GÍ vann heimadystin móti Sumba við tveimum málum móti ongum, men tað var ikki fyrr enn í seinastu minuttunum, at stigini vórðu fingin til høldar*

JÁKUP MØRK

GÍ-Sumba 2-0 (0-0)

Einki var at taka seg aftur í, at gøtumenn vóru favorittar, tá teir sunnudagin skuldu royna seg móti sumbingum.

Sumba, sum nú spælir triðja árið á rað í bestu deildini, hevur sum aðalmál at varðveita sessin í fremstu røð, meðan gøtumenn hinvegin hava verið »liðið« í føroyskum fótbólti seinasta tíggju ára skeiðið ella so.

Tey bæði seinnu árini hava málríkastu dystirnir á árinum júst verið uppgerðirnar millum GÍ og Sumba, so mong vóru helst, sum væntaðu, at Sumba enn einaferð skuldi verða kanónføði hjá gøtumonnunum. Harumframt høvdu gøtumenn nakað av hevna, tí sæð í bakspeglinum var tað júst javnleikurin suðuri í Sumba, sum kostaði teimum gullmerkini í fjør, so alt talaði fyri einum greiðum heimasigri.

**Tamur fyrri hálvleikur**

Líkt var tó beinanvegin til, at sumbingar als ikki ætlaðu at geva nakað frá sær, nú teir høvdu lagt leiðina norðureftir.

Allan fyrra hálvleik løgdu teir sera stóran dent á verjuspælið, har Marlon Kjærbo, sum nú aftur spælir við Sumba, royndi at stýra monnum sínum.

Taktikkurin hjá sumbingum eydnaðist eisini rættuliga væl, tí fyrstu trý korterini megnaðu teir at halda skurunum frá fatinum, soleiðis at tað framvegis stóð á jøvnum, tá farið varð til hálvleiks.

Áskoðaravinarligan fótbólt var tó ongantíð talan um hesi trý korterini. Sumbingar góvu sær góðar stundir til at avgreiða deyðbóltsstøður sínar, og hetta var eisini viðvirkandi til, at ferðin á dystinum gjørdist rættuliga lág.

**GÍ átti alt**

Í seinna hálvleiki legði heimaliðið beinanvegin bragdligari fyri, men hóast talan nú gjørdist um fleiri vandamiklar royndir, so eydnaðist tað teimum ikki at skjota mál.

Eigil Olsen tók sær av tí allarmesta, sum kom, og var málverjin ikki á rætta stað, so hevði hann træverkið at líta á.

Sum dysturin leið, gjørdust teir á heimaliðnum alsamt grammari at fáa mál, og tá eini tíggju minuttir vóru eftir at leika, var um reppið at hetta kostaði. Jan Poulsen slapp oman at baklinjuni, men tá hann skuldi leggja bóltin út frá, heilkiksaði hann, og so var tann royndin av ongum.

Lítla løtu seinni eydnaðist tað so heimaliðnum at fáa bóltin í netið, men tá hetta hendi, fingu teir kortini góða hjálp frá sumbingum. Eitt skot varð sent úr vinstru síðu, sum Eigil hálvbjargaði, men tá Marlon skuldi sparka bóltin burtur, langaði hann til á tvørtræið, haðani bólturin støkk á høvdið á Óla og so í málið.

Málið avgjørdi í roynd og veru dystin, men áðrenn dómarin hevði bríksláð fyri seinastu ferð, høvdu gøtumenn aftur havt bóltin í netinum. Hetta hendi tá sumbingarnir vóru heldur óansnir í verjuni. Bólturin varð trillaður tvørturum vøllin. Hans Pauli Petersen fekk fatur á honum og gjørdi skjótt av. Kósin varð sett móti málinum, og einsamallur við Eigili kundi hann sláa sigurin fastan.

**Sumbingar harmaðust**

Sum vera man, so vóru sumbingarnir sera harmir um, at annað stigið soleiðis glapp teimum av hondum í evstu løtu.

Ikki tí, sum skilst ásannaðu teir eisini, at GÍ sigurin allarhelst var uppiborin, men tá teir nú megnaðu at halda málið reint í 85 minuttir, so er sjálvandi keðiligt at standa eftir við ongum.

Gøtumenn fingu sostatt fyrstu stigini á árinum, og hóast flestu áskoðararnir lata illa at, tá tosað verður um vónirnar fyri árið, so man tað neyvan vera at taka ov dyggan til, tá vit gita, at Johan ivaleyst fer at fáa okkurt gott burtur úr.

Fyri einum ári síðani vóru í øllum førum ikki mong, sum roknaðu við, at GÍ bert skuldi vera ein javnleik í Sumba frá meistaraheitinum, men eisini ta ferðina eydnaðist tað venjaraúrmælinginum at fáa úrslitini við sær.

**GÍ-Sumba 2-0 (0-0)**

1-0 Óli Hansen 84.
2-0 Hans Pauli Petersen 90.

Dómari: Birgir Sondum

**GÍ:**

Sunnvard Joensen - Áslakur Petersen, Bartal Eliasen, Leivur Hansen - Rúni Justinusen, Jóan Pauli Olsen, Magni Jarnskor, Henning Jarnskor, Súni Olsen - Óli Hansen, Hans Pauli Petersen

**Sumba:**

Eigil Olsen - Bergur Winther, Marlon Kjærbo, Dánjal Johan Joensen - Mortan úr Hørg, Sasa Tomajek, Spasojé Biberdzic, Hans Jacob Thomsen, Nikola Biberdzic - Eirikur Joensen, René Thomsen



# Valdemar stjól stigini

*1. deild: Venjarin hjá VB hevur ilt við at fata, at tað skuldi bera til hjá hansara liði ikki at vinna á sandoyingunum, sum síðstu løtuna stóðu í egnum brotsteigi*

VB-B71 1-0 (0-0)

Sandoyingar vóru í sera góðum skørum, tá teir seint seinnapartin sunnudagin á Drelnesi fóru umborð á Smyril. Og tað var væl skiljandi. Útgangsstøðan á Vágseiði hevði víst, at teir einki høvdu havt ímóti at hava stigið norður aftur við í viðførinum, sum teir høvdu suður við. Tá teir fóru norður aftur, høvdu teir øll stigini, og tað var væl klárað.

Í góðveðrinum á Vágseiði var VB leikliga omaná alla tíðina. Í fyrra umfarinum var yvirvágin ikki fullkomin, men vágbingarnir høvdu fleiri gyltar møguleikar at fáa málið, sum ivaleyst hevði havt við sær, at talan hevði verið um fleiri mál og harvið tryggan sigur.

Popczynski sendi í stólpan, og Jón Pauli Olsen bíðaði ov leingi, og so fór royndin við síðuna av.

Í 2. hálvleiki trýsti VB sandoyingarnar í botn. Teir høvdu fleiri stórar møguleikar, men teir megnaðu ikki at skora, og so hendi tað, sum ikki er ókent í fótbólti: miðvallarin í vinstru, Kári Nielsen, fór til baklinjuna og legði innfyri, har nýggi havnarmaðurin á sandoyarliðnum, Høgni Hansen, sum í fjør spældi við ÍF, stútaði í kassan.

**Ov lítið hugflog**

Tá sandoyingar fingu mál var seinna umfarið átta minuttir gamalt. Málið hevði við sær, at VB trýsti uppaftur meiri fyri at vinna. Teir raktu í stólpan, og teir misnýttu fleiri ferðir, tá teir royndu við langskotum, og tá teir vóru einsamallir við málverjanum.

Fyritreytirnar at skora vóru serliga góðar, tá tað restaði eitt korter. Popczynski gjørdist leysur, tá hann hevði fingið tak á innleggi. Bergleif Sólsker, sum hevði verið í miðverjuni saman við Jón Brekku og Bernhardi Petersen, togaði spælandi venjaran niður, og dómarin bríkslaði fyri brotssparki og vísti B71 manninum reyða kortið.

Popczynski tók sær sjálvum av brotssparkinum, men Nowisci tveitti seg rætta vegin og bjargaði.

Síðsta korterið vóru allir tíggju B71 menninir í og kring egnan brotsteig. Trýstið var øgiligt, men uppløgdu møguleikarnir vóru ikki so ógvuliga nógvir hesa løtuna. Vágbingar løgdu bóltarnar út í síðurnar, og í staðin fyri at koma til baklinjuna og at leggja innfyri, vóru teir ótolnir og løgdu skrábóltar í brotsteigin, og tað var barnamatur hjá stórspælandi málverjanum.

**Skotvenjing**

– Eg eri ikki illa nøgdur við spælið hjá okkum. Tað hekk hampuliga væl saman. Vit spældu okkum til nógvar møguleikar, men vit vóru alt ov ússaligir frammanfyri málinum. Veðrið hevur verið so vánaligt, at vit í nógvar vikur bara hava vant innandura. Í síðstu viku vandu vit uttandura, men avrikið hjá okkum boðar frá, at kanónirnar eru ikki nóg væl stillaðar. Sjálvur haldi eg, at Robert og eg eiga at skora, sjálvt um vit ikki hava havt so nógva skotvenjing. Vit eru yrkisspælarar, og tí eiga krøvini til okkara at vera størri, enn tey eru til amatørarnar.

Hetta sigur Krzystof Popczynski, venjarin hjá VB. Hann heldur, at landsmaður hansara í B71 málinum, Waldemar Nowisci, spældi framúr væl, og veteranurin hjá B71, Eli Hentze, er samdur við VB venjaran:

– Eg haldi, at vit løgdu allir meiri enn eitt hundrað prosent í. Fyritreytirnar hjá okkum batnaðu, sum tíðin leið og teir ikki høvdu fingið hol á. Valdemar Nowisci kom til okkara í 1994, men eg havi ongantíð sæð hann verið so væl upplagdan, sum hann var sunnudagin. Tvær av bjargingunum vóru í heimsflokki, og sjálvsagt var Valdemar í eyka góðum hýri, tá tað undir so stórum trýsti eydnaðist honum at halda landsmonnunum báðum í VB álopinum burtur frá at skora.

**Tveir nýggir**

Bæði VB og B71 høvdu nýggjar útlendingar á liðnum. Hjá B71 var Alex Nielsen fyri fyrstu ferð í álopinum. Hann hevur spælt seriufótbólt í Danmark. Tað er venjarin hjá B71, Per Langvad, sum hevur fingið tætta og skjóta álopsmannin til Føroya. Hann kom henda vegin fríggjakvøldið, og longu sunnudagin var hann í B71 álopinum.

Hvussu danin hjá sandoyingum fer at roynast, fæst at síggja, tá hann fer at venja seg við undirlagið.

Tað sama kann sigast um jugoslavan Predrag Zivkovic, sum var vongverji í høgru hjá VB – bæði í Sumba og ímóti B71. Sunnudagin fór hann av vøllinum, tí hann hevði ein snudd í knænum. Bæði fyri bóltførleikan og likamsførleikan tekur tað sína tíð at venja seg við graslíkisvallirnar.

JH

**VB-B71 0-1 (0-0)**

0-1 Høgni Hansen

**VB:**

Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Janus Kjærbo, Eyðun Kjærbo – Tórður Holm, Mikael í Lágabø, Milan Kulic, Jón Pauli Olsen – Robert Cieslewicz, Krzystof Popczynski

**B71:**

Valdemar Nowisci – Rúni í Soylu, Bergleif Sólsker, Jón Brekku, Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen – Eli Hentze, Julian Floresco, Kári Nielsen – Høgni Hansen, Alex Nielsen



*Waldemar Nowicki var uttan samanbergin besti maður á Eiðinum sunnudagin, tá hann nærum einsamallur tryggjaði B71 øll stigini*



*Ikki gekk long tíð, áðrenn Gunnar Mohr staðfesti, at máltevið framvegis er í lagi*

# NSÍ meiri málsøkið

*2. deild: Næstbestu runavíkingarnir vunnu greiðan sigur á teimum hjá HB, sum bæði hevði forman og nevndarformann á liðnum*

NSÍ–HB 4–1 (3–1)

Hóast HB fekk fyrsta málið, so var tað skjótt, at tað leygardagin var greitt í Runavík, at NSÍ hevði meiri málsókna fólkið.

Hjá HB vóru nógvir ungir menn á liðnum. Undantøkini vóru teir báðir gomlu 1. deildarmenninir, Gunnar Mohr, sum nú er formaður í HB, og so Kaj Leo Johannesen, sum er formaður í partafelagnum Havnar Fótbóltur.

Í 1. hálvleiki vóru hesir báðir í álopinum. Eftir steðgin loysti Kaj Leo Johannesen unga málverjan Danny Rasmussen av.

Í Runavík staðfestu teir longu eftir tíggju minuttir, at máltevinum hjá Gunnari Mohr bilar einki. Gamli málrevurin kom ímillum, tá teir í NSÍ verjuni spældu uppá tvørs, og royndi maðurin var tryggur, tá hann kom einsamallur við Ólavi Højgaard, sum annars stóð seg væl í málinum.

Tað gingu bara tveir minuttir, so hevði miðvallarin í vinstru, Bergur Djurhuus, javnað. Aftur hesa ferð var talan um óskettið verjuspæl. Bergur skoraði beinleiðis uppá hornaspark. Bólturin kom flatt móti málinum og fór inn við nærra stólpanum.

Á hálva tímanum stóðu teir báðir tvíburðarnir hjá NSÍ, Jan og Ken Nónklett, fyri leiðslumálinum. Miðvallarin Ken Nónklett royndi við skoti móti málinum, Danny Rasmussen hálvbjargaði, og álopsmaðurin Jan Nónklett var fyrstur á returinum.

Stutt undan steðginum økti Bergur Djurhuus, tá hann fór ígjøgnum í vinstru og royndi við skoti úr rættuliga spískum.

Tað sást væl, at talan var um fyrsta landskappingardystin. Spælið var einki at reypa av, og ferðin hevur onkuntíð verið hægri. Í 2. hálvleiki hevði HB bóltin meiri enn teir í NSÍ, men HB megnaði ikki at spæla seg til stórvegis møguleikar. í staðin var tað Fróði Jóannesarson, sum í 2. hálvleiki var skiftur inn í álopið hjá NSÍ, sum staðfesti sigurin.

Fimm minuttir vóru eftir, tá hann fekk bóltin mitt fyri málinum, dró eitt vet til høgru og smekkaði í handara síðunetið.

JH

2. deild: NSÍ–HB 4–1 (3–1)
0-1 Gunnar Mohr
1-1 Bergur Djurhuus
2-1 Jan Nónklett
3-1 Bergur Djurhuus
4-1 Fróði Jóannesarson